Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 2.3.1 Snið til sundurbýti

## Evni

- Snið til sundurbýti
- Trækonstruktión

## Mælt tíðarlongd

25 min.

**Viður**

Undirvísingartilfartil skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Í tilfarinum er eitt sjónband, sum innleiðir lærlingin til meginregluna snið til sundurbýti. Endamálið við sjónbandið er at geva næminginum fatan av hugtakinum snið til sundurbýti og hvat tað inniber innan byggivinnuna. Hetta inniber umhugsanir um, hvørjar avleiðingar kunnu koma, tá man byggir/ikki byggir eftir hesum meginregluni. Sjónbandið innleiðir hugtakið yvirskipað, men setur tað í samband við træbygging.

Til sjónbandið er eitt venjingarblað við spurningum, sum tryggjar, at lærlingurin arbeiðir við viðkomandi evnum, sum ger tað møguligt at náa lærumálunum fyri tilfarið.

At enda verður vitanardeiling í flokkinum, har lærlingurin fær møguleika at deila síni svar uppá spurningarnar í venjingarbløðunum og hugsa um innihaldið í sjónbandinum.

## Fyrireiking

Lærarin skal:

- Kunna um tilfarið/gongdina
- Byrja við at seta lærlingin í gongd við at hyggja at sjónbandið
- Hjálpa lærlinginum við ráðgeving til at svara venjingarbløðunum.
- Stýra vitanardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at leggja síni svar fram til venjingarnar, umframt at leggja afturat spurningum, forkláringum og viðmerkingum.
- Hjálpa við at greiða frá svarum frá luttakaranum og skriva tey sum felags floksviðmerking.

Luttakarin skal:

- Kunna síggja og hoyra sjónbandið
- Kunna greiða frá (deila vitan) við at svara spurningunum í venjingarbløðunum
- Kunna lurta eftir svarum frá øðrum luttakarum
- Kunna gera viðmerkingar fyri at minnast sína vitan og sínar meiningar.

# Læraravegleiðing: 2.3.1 Snið til sundurbýti

Skipan:

- Undirvísingin verður leidd við eini blanding av sjálvstøðugum arbeiði og bólkaarbeiði. Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini sjálvstøðugt ella í smærri bólkum.

## Læringamál

- Lærlingurin kann greiða frá fyrimununum við at byggja eftir meginreglunum "snið til sundurbýti" (V1).
- Lærlingurin kann meta um, ein serligur lærugreina konstruktión er "snið til sundurbýti" (H2).
- Lærlingurin kann gera snið til trækonstruktiónir, sum kunnu takast sundur og endurnýtast (F2).

## Innihald og endamál

Endamálið við innihaldinum er at geva lærlinginum vitan um, hvussu man kann ger snið til trækonstruktiónir og hvussu tað kannbyggjast, soleiðis at tað kann takast sundur og endurnýtast.

## Uppskot til undirvísingargongd

Lærarin byrjar undirvísingina og leggur tilfarið/gongdina fram (5 min):

- Innleiðing/endurinnleiðing til heimasíðuna.

Sjónband (5 min):

- Lærlingurin hyggur at sjónbandið 2.3.1.

Uppgávur til sjónbandið (10 min):

- Eftir at lærlingarnir hava sæð sjónbandið, arbeiða teir við at svara spurningum og loysa uppgávur tengdar at evninum fyri at tryggja, at lærlingurin hevur viðgjørt innihaldið í mun til lærumálini.

Samandráttur í felag (5 min):

- Lærarin stýrir einari uppsamling av nýggju vitanini, sum lærlingurin hevur fingið.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaran til at fata og hugsa um innihaldið í sjónbandinum, umframt at leita eftir upplýsingum um evnið, gevur møguleika at geva meira ella minni framkomin boð uppí vitanardeilingina.

## Feedback og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beinleiðis feedback frá læraranum, tá lærarin hjálpir við at greiða frá grundgevingunum, áðrenn íkasti verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at "góð" boð verða góðtikin og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv íkast verða endurtulkað saman við læraranum, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.